# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hon veit, at myndamenninir koma, og at ein mynd við ísin í Grønlandi kann koma væl við (Guido Westerwelle)*

## Harðasti skjálvtin í 50 ár

**Jarðskjálvtin, sum var í Peru síðstu nátt, var ikki bara harður, men eisini drúgvur**

Mátitólini hjá amerikanska jarðfrøðistovninum fóru heilt upp á 7,9 í nátt, tá ein jaðskjálvti skakaði stórar partar av Peru. Hóast miðdepilin í skjálvtanum var 145 kilometrar frá høvuðsstaðnum Lima, vístu tey jarðfrøðiligu mátitólini í býnum 5,9, og skjálvtin er eisini tann harðasti í Peru tey seinastu 50 árini.

Á middegi í dag søgdu myndugleikarnir, at 72 fólk vóru funnin deyð, og um leið 680 høvdu fingið skaða. Samstundis søgdu embætismenn, at talið á deyðum fór helst at veksa út á dagin.

Í Lima vóru ristingarnar so ógvusligar, at fólk tustu ræðsluslígin út á gøtuna, og tað bøtti ikki um støðuna, at streymveitingin slitnaði. Í einum stórhandli kom eldur í, og fleiri hús rapaðu, tá nakrir eftirskjálvtar komu.



*Nógv fólk rýmdu út, tí tey bóru ótta fyri, at húsini fóru at rapa*

## Tað var ikki blóð hjá Madeleine

**Blóðblettirnir, sum portugisiska løgreglan fann í kamarinum, haðani Madeleine McCann hvarv, eru ikki frá henni**




*Gary og Kate McCann halda framvegis uppá, at Madeleine er á lívi*

Teir fýra blóðblettirnir stava sambært enska blaðnum Daily Mirror frá einum evropeiskum manni, sum hevur búð í sama kamari. Íbúðin, sum kamarið er partur av, er leigað út fleiri ferðir, síðani Madeleine McCann hvarv tann 3. mai, og maðurin leigaði íbúðina eitt tíðarskeið í summar, skrivar blaðið.

Portugisiska løgreglan er kortini sannførd um, at tann fýra ára gamla gentan er deyð.

- Vit hava fleiri upplýsingar at halda okkum til, sigur talsmaðurin hjá løgregluni, Olegario Sousa, við Daily Mirror.

Foreldrini hjá Madeleine halda harafturímóti uppá, at gentan er á lívi, og tey hava higartil sýtt fyri at fara úr Portugal. Mamman, Kate McCann, sigur kortini við Daily Mirror, at tey hava ongan hug at fara aftur til Bretlands, fyrr enn Madeleine er funnin, men at tey noyðast eisini at hugsa um hini børnini.

- Men eg dugi ikki at ímynda mær, at vit komu higar sum fimm og skulu heim aftur sum fýra, sigur Kate McCann við Daily Mirror.

## Finnast at Grønlands-ferð hjá Angelu Merkel

**- Hon fer, tí myndamenninir koma við, siga andstøðuleiðararnir**

Politiska andstøðan í Týsklandi heldur lítið um avgerðina hjá Angelu Merkel, kanslara at fara til Grønlands við Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, so hon kann sleppa ein túr við báti út á Ísfjørðin at síggja, hvørja ávirkan tann veksandi hitin á jørðini hevur har. Formaðurin í liberala flokkinum FDP, Guido Westerwelle, sigur við DPA- tíðindastovuna, at kanslarin fer til Grønlands, tí hon veit, at nógvir myndamenn koma aftan á henni. Tað sama sigur formaðurin hjá Teimum Grønu, Reinhard Bütkofer.

### STUTT SAGT

## 214 druknað

214 fólk eru druknað, og umleið 300.000 eru vorðin heimleys í Norðurkorea, sum í hesum døgum verður herjað av teirri ringastu vatnflóðini seinastu tíggju árini. Myndugleikarnir siga, at eftir tveimum døgum regnaði tað 600 millimetrar, og tað gjørdi, at stór landbúnaðarøki standa undir í vatni. Fólk hjá altjóða Reyða Krossi, sum eru í Norðurkorea, siga, at tað er vanligt við vatnflóð í juli og august, men at tað hevur regnað óvanliga illa í ár.

## Nógv sjálvmorð

Í fjør tóku 25 amerikanskir hermenn tóku lívið av sær, meðan teir gjørdu tænastu í Irak ella í Afghanistan. Tilsamans beindu 99 amerikanskir hermenn fyri sær sjálvum í fjør, og so stórt hevur talið ikki verið tey seinastu 26 árini, sigur verjumálaráðið Pentagon. Um orsøkina verður sagt, at strongd, trupulleikar við gentu ella konu og fíggjarligir trupulleikar fáa altsamt fleiri hermenn til at beina fyri sær sjálvum.

## Val uttan Hamas

Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, umhugsar at broyta vallógina til tess at forða fyri, at Hamas sleppur at stilla upp til næsta tjóðartingsvalið. Í gjár ljóðaði, at Abbas ætlar sær at krevja, at øll, sum stilla upp á næsta vali, skulu vátta, at tey virða ta politisku stevnuskránna hjá PLO, men enn eru eingi slík boð komin. Sambært stevnuskránni hjá PLO viðurkenna palestinar ísraelska ríkið, men tað sýtir Hamas fyri at gera.